

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 02 - 2012

# Atlantic Petroleum á Torradøgum í Klaksvík

Torradagarnir í Klaksvík, sum verða hildnir hesa tíðina á hvørjum ári og sum eru bæði eitt mentanarligt og fiskivinnuligt tiltak, fara hesaferð eisini at fevna um oljumál. Fyrireikararnir hava nevniliga sett føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum á skránna. Mikukvøldið klokkan 19.30 fer Mourits Joensen, fíggjarstjóri í felagnum at halda fyrilestur undir heitinum - Atlantic Petroleum møguleikar og avbjóðingar. Tiltakið verður í Skúlanum við Ósánna. Atlantic Petroleum varð stovnað í 1998 og er í dag partur av trimum leitiloyvum í føroyskum øki. Felagið er eisini við, tá borurin verður settur í á landgrunninum í summar. Umframt virksemi í Føroyum er felagið eisini partur av leitivirksemi í Bretlandi og Írlandi og framleiðir kolvetni frá trimum oljukeldum í bretska partinum av Norðsjónum. Roknskapurin fyri farna ár verður annars lagdur fram komandi fríggjadag. Aðalfundur er 24. mars í Havn. Tiltakið í Klaksvík er tað triðja av sínum slag hesar seinastu mánaðirnar, har leiðslufólk í føroyska oljufelagnum greiða frá. Frammundan hevur stjórin í felagnum, Ben Arabo hildið fyrilestrar á Vinnuháskúlanum og á aðalfundinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Boð eru eisini eftir Atlantic Petroleum at halda fyrilestrar í útlandinum. Í apríl fer Ben Arabo at halda fyrilestur á eini ráðstevnu um keyp og sølu innan oljuvinnuna. Á somu ráðstevnu fara eisini tveir aðrir føroyskir oljustjórar, Graham Stewart frá Faroe Petroleum og Teitur Poulsen frá Det Norske Oljeselskab at halda fyrilestrar. Mynd - Á skrivstovuni hjá Atlantic Petroleum í London.